# Hollendska sjúkan og føroyskur



*Politiska skipanin hevur alla ábyrgdina av, at okkara náttúrutilfeingi, tað verið seg fiskur ella olja og gass, skulu umsitast*

VINNUKRONIKKUR
*Gordon Ejdesgaard*

Búskaparliga fyribrigdið Hollendska sjúkan hevur sína longu søgu. Vit finna sjúkdómseyðkennini í Spaniu um ár 1500. Dýrur málmur streymaði til landið úr hjálondunum. Úrslitið gjørdist ein fýrfalding av prísstøðinum innan ár 1600. Ikki nakað vit í dag hugsa um sum eitt løgið fyribrigdi. Men í Spaniu var tjóðin skelka. Fyribrigdi hevur seinni fingið navnið Hollendska sjúkan.

Hugtakið er vert at taka upp, nú talað verður um búskaparliga framtíðarætlan. At leggja framtíðarætlan, so langt sum 10 ár fram, fyri samfelagið alt er ikki ráðiligt uttan at hava hugsað seg sera væl um.

Vit kenna øll hóp av ætlanum, sum eru miseydnaðar. Hetta er tí samfelagsskipanin er opin og lætt ávirkilig. Her kunnu bert nevnast dømi sum prísurin á olju og fiski sum faktorar, ið hava stóran týdning í okkara samfelag. Vit eiga tó ikki at halda okkum aftur, bert tí tað ikki hevur eydnast fyrr at leggja framtíðarætlanir.

Men sannroynd er, at trupulleikarnir vit síggja í dag eiga at geva ábyrgdarpolitikkarum nakað at hugsa um. Tó at trupulleikarnir í dag eru fyri einki at rokna sammett við kreppuna í 90-unum.

Skal ikki siga annað enn at løgmaður hevur dirvi. Tað skal til í verandi støðu. Er tó ein 10 ára ætlan ikki nakað framsøkin? Og hvussu skulu vit máta tað at vera "framkomin"ella "fremst"? Er tað til dømis í lagi, at í BTÚ/íbúgva eru vit á 3. plássi meðan bert 10% av fólkinum býr á bygd, og vit øll eru sibbar? Her er hópur av mátitrupulleikum, ikki minst at definera "framkomin" ella "fremst".

Hvør er myndin av føroyska samfelagnum um 10 ár? Og hvørja mynd ynskja vit at síggja? Eg seti spurningingarnir, men hvørki kenni ella vil kenna svarið. Vil landsstýrið royna at finna svar, eru mangir partar, sum kunnu hava okkurt ískoyti til hesa framtíðarætlan. Sjálvur havi eg ongantíð lagt ætlanir longur enn 5 ár fram. Og ætlanirnar hava kortini ongantíð hildið.

So mín viðmerking skal bert viðgera eitt møguligt ískoyti til búskapin. Eina oljuvinnu.

Aftur til Hollendsku sjúkuna. Búskaparfrøðingar fingu av álvara sjón fyri søgn eftir at Holland hevði funnið stórar mongdir av gassi í 1960-unum. Ríkidømi streymaði inn í landið av hesi orsøk. Men búskaparligi vøksturin stirnaði eftir fáum árum. Frá 1974 tá olju- og gassvinnan var minni enn 4% av BTÚ øktist henda til 8% í 1985 og minkaði síðan aftur til 2 til 3 % av BTÚ. Hetta sama fyribrygdi er kent frá Bretlandi í tíðarskeiðnum 1975-86. Fyrst knappligur vøkstur og eftirfylgjandi knapplig minking.

Trupulleikin er ikki at peningur streymar inn í samfelagið. Men at nýtslan gerst ótálmað. Peningurin verður nýttur til minni góðar og vánaligar íløgur. Høvuðstrupulleikin í allari miseruni var, eftir míni metan, at gassríkidømið varð uppfatað sum inntøka og ikki sum ognarvirði ella fæ.

Thorvaldur Gyflason, Røgnvaldur Hannesson, og Arne Jon Isachsen, professarar, hava í bókini "Hva gjør oljepengene med oss?" tikið henda spurningin upp.

Hollendska støðan sigur nógv um vandan í Føroyum. Knappliga streymar peningur til samfelagið. Úrslitið gerst tó heilt annað